# Løgmansskrivstovan

**Til ummælis**

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 12.04.2019 |
| Mál nr.: | 0626-081/19 |
| Málsviðgjørt: | JSS |
| Eftirkannað: | Lógartænastan dagfestir |

**Uppskot til**

**Kunngerð um broyting í kunngerð um vápn v.m.**
(Nágreining av ásetingunum um hvør útflýggjar útflutningsloyvi)

**§ 1**

Í kunngerð nr. 57 frá 12. september 1969 um vápn v.m., verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** Heitið á kunngerðini verður orðað soleiðis:

“**Kunngerð**
**um**
**krøv til innflutning, útflutning, goymslu o.a. av vápnum og lóðri**”

**2.** Inngangurin verður orðaður soleiðis:
“Við heimild í § 3 c og § 4, stk. 1-3 í løgtingslóg nr. 43 frá 22. mai 1969 um vápn v.m., sum broytt við løgtingslóg nr. 81 frá 22. mai 2015, verður ásett:”

**3.** § 1, stk. 2, 3. pkt. verður strikað.

**4.** § 1, stk. 3 verður strikað, og í staðin verður sett:
“*Stk. 3.* Landfútin letur útflutningsloyvi til vápn og lóður nevnd í § 1, stk. 1 í løgtingslógini.
*Stk. 4.* Umhvørvisstovan letur útflutningsloyvi til vápn og lóður nevnd í § 2, stk. 1 í løgtingslógini.
*Stk. 5.* Í umsóknini sambært stk. 3 og 4 skal upplýsast:
1) Navn, bústaður og persóntal hjá viðkomandi.
2) Nummar á vápnaprógvi.
3) Slag, navn, modell og seriunummar á skotvápni.
4) Navn, stødd og nøgd av lóðri, um lóður eisini skal útflytast.
5) Endamálið við útflutninginum.”

**§ 2**

Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Løgmansskrivstovan, x. apríl 2019

**Aksel V. Johannesen**
løgmaður

/ Marjun Hanusardóttir